# Starvsfólk til søludeildina

Søkt verður eftir fólki til søludeildina hjá Atlantic Airways á flogvøllinum.

**Arbeiðið fevnir m.a. um:**

- bílegging av ferðaseðlum og pakkatúrum
- telefontænasta/vegleiðing
- help-desk tænastur
- leiðbeining í sambandi við netbókingar

**Førleikakrøv:**

Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur

- útbúgving ella royndir innan skrivstovuyrkið
- hevur kunnleika til bókingarskipanir og ferðaseðlasølu
- dugir at arbeiða við teldu
- hevur evni at samstarva og er ágrýtin
- kann arbeiða sjálvstøðugt
- kann arbeiða undir trýsti

Vit bjóða eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum og møguleika fyri fakligari og persónligari menning í einum góðum og dynamiskum umhvørvi.

Skrivlig umsókn við møguligum prógvum og viðmælum skal vera okkum í hendi seinasta lagi 30 apríl 2008. Nærri upplýsingar kunnu fáast um starvið hjá Heidi Askham (Søludeildin), tlf. 34 10 10, heidia@atlantic.fo

**Umsókn skal sendast til:**
Atlantic Airways, Starvsfólkadeildin (Human Resources), Att.: Georg Suðurgarð Vága floghavn, 380 Sørvágur, ella til georg@atlantic.fo.

sansir.fo

Atlantic Airways er ein altjóða fyritøka, hvørs virkismentan er eyðkend av, at fokus altíð er á trygd, stundvísi, kundan og úrslitið. Umleið 250 fólk starvast í føroyska tjóðarflogfelagnum, sum hevur heimstað í Sørvági. Árligi umsetningurin í 2007 var 539 milliónir krónur.
Atlantic Airways hevur sjey flogfør og fýra tyrlur undir sínum veingjabreiði. Flogførini røkja rutusamband úr Føroyum til ymsar býir í Danmark og grannalondunum Onglandi, Skotlandi, Hetlandi, Íslandi, Grønlandi, Noregi og Svøríki. Harumframt er virksemið víðfevnt í øðrum londum við leiguflogførum, og umleið helvtin av inntøkunum kemur úr útlondum. Tyrludeildin røkir ferðasamband til útoyggjarnar, leiti- og bjargingartænastu og off-shore flúgving í Norðurhøvum.

Tel 34 10 00 · Faks 34 10 01 ATLANTIC AIRWAYS atlantic.fo

# Arbeiði sum kavari?

Vit sóknast eftir kavarum til fulltíðarstarv í Føroyum.

Vit bjóða tær eitt spennandi og øðrvísi starv, har vit raðfesta tænastu og góðsku í øllum tí, vit gera. Tú verður partur av vælvirkandi virki okkara, sum arbeiðir út frá Klaksvík, og runt um í øllum landinum.

Tú kemur fyri tað mesta at arbeiða í tættum samstarvi við alivinnuna.

Vit vænta, at tú ert ágrýtin, røkin og nærlagdur. At tú ikki ert bangin fyri avbjóðingum, og at tú setir tørvin hjá kundanum í hásæti.

Fyrimunir hevur tú,

- um tú hevur vinnubræv sum kavari ella á annan hátt kennir til kaving
- um tú hevur arbeitt á alibrúki, á sjónum ella á annan hátt hevur royndir innan tílík arbeiði

Um tú ikki lýkur hesi krøv, men tó hevur viljan og røttu fortreytirnar fyri at blíva ein góður kavari, vilja vit virka við til, at tú kanst verða sendur á kavaraskúla og eisini á annan hátt ført ognað tær royndir til hetta yrkið.

Fyrispurningar kunnu stílast til jtkaving@jtkaving.fo ella á tel. 228855

Løn- og setanartreytir sambært avtalu.

Um hetta er nakað fyri teg, send so eina umsókn til okkum innan 10. mai 2008.

VASTI 459010







JT-KAVING sp/f Heygavegur 50 FO-700 Klaksvík

# Søkt verður eftir kokki til Krásadeildina í Miklagarði

Søkt verður eftir kokki til Krásadeildina í Miklagarði at arbeða 40 tímar um vikuna, tó ikki um kvøldið og sunnudag.
Løn eftir avtalu.

Áhugað verða biðin um at venda sær til Jørgen Jørgensen á tel 21 74 04 ella á jorgen@jyde.dk

MIKLAGARÐUR



Døgg